# Bóltglaðir fuglfirðingar millum biddarar í Jamaika

**Í hesi frásøgn eru vit farnir frá Føroyum, yvirnátta tvær nætur í Keypmannahavn, ferðast til JamaiKa, har vit millumlendu í París og Miami. Í skrivandi løtu skulu vit yvirnátta á Jamaica, har vit í morginárini klokkan átta flúgva víðari til Kuba**



*Hanus Eliasen og Atli Petersen*

## Fakta um Jamaica

**Høvuðsstaður:** Kingston
**Íbúgvatal:** 2,8 mió fólk
**Mál:** Tað lokala málið verður kallað patois, hetta er eitt mál sum byggur á tað enska málið og einstøk sponsk orð og tónalag.

**Nøkur viðurskifti, sum hava sett Jamakia á heimskortið:**
**Rastafari:** Nógv vilja verða við at hetta er ein átrúnaður, men talan er meir um eina politiska hugsjón. Ein hugsjón sum vísir á frígerðing og skapan av einum afrikanskum stati. Tað sjónliga eyðkenni við einum Rastafarian er at hann hevur dreadlocks. At lata hárið hjá sær vaksa og roykja cannabis er ein partur av Rastafarian. Roykingin verður gjørd meðan lisið verður úr Bíbiluni fyri at fáa betri samband við hægri maktir.

**Bob Marley:** Kongur innan Reggae tónleikin og Rastafarian

**Usain Bolt:** Heimsins skjótasti maður nakrantíð, bæði í 100 og 200 metrum. Hesi metini tók hann í OL í summar.

FERÐAFRÁSØGN
*Atli Petersen*
*atli@knassar.com*

Leygarkvøldið 22. novembur komu vit til Keypmannahavnar. Har yvirnáttaðu vit í tvær nætur, har høvi var at møta ymiskar vinir og kenningar, sum búleikast í Keypmannahavn, m.a. so fóru vit ein túr í Tivoli, har tey hava pyntað upp til jóla - sera hugnaligt. Mánamorgunin flugu vit víðari, millumlendu í París og Miami, inntil vit, 18 tímar seinni, komu til Jamaika, okkara fyrsta veruliga ferðastað á ferðini. Vit rendu okkum í smátrupulleikar beinanvegin, tá Atli las á eini læknaheimasíðu, og sá at hann mangladi at fáa eina vaccination. Í samstarv við Fonnflog og Henry Petersen (beiggja Atla í Keypmannahavn) megnaðu vit at fáa fatur á tí røttu vaccinuni í Miami, har læknin var bert fimm minuttir frá flogvøllinum, áðrenn leiðin gekk víðari til Jamaika.

Fyrsta morgunin í Jamaika gingu vit úti ein lítlan túr á eini kei, har ein maður kemur yvir til okkum. Hann sigur seg eita O´Neill og spyr, hvat vit gera her og hvat ørindi vit hava á Jamaika. Eftir eina langa samrøðu bjóðar hann seg at vísa okkum nøkur áhugaverd støð á Jamaika, sjálvandi fyri eina vissan pening. Vit taka av og lítlan tíma seinni sita vit í einum bili, ávegis til nøkur støð á Jamaika. Tá tað var soleiðis, at vit yvirnáttaðu í Port Royal, hildu vit at tað var nærlagt at vitja gamla fortrið Fort Charles, sum liggur í umráðinum. Her man kann síggja leivdirnar av jarðskjálvtanum, sum var í 1692. Hesin jarðsskjálvtin gjørdi at tveir triðingar av Port Royal, sum var tá høvuðsstaður, sakk undir sjógv og bleiv tí sera meint raktur og misti tí høvuðsstaða heitið til Kingston. Port Royal er blivin ein gimsteinur hjá arkeologum, sum kalla býin fyri »Býurin, ið sakk«.

Eftir hetta fingu vit ein sera áhugaverdan túr inn í »heimin« hjá umtókta tónleikaranum Bob Marley. Flestum kunnugt, hevur Bob Marley verið ein ímynd av Jamaika og Rastafari (sí í tekstboksini). Maðurin hevur skrivað og framført tónleik, sum hevur bergtikið allan heimin, og hendan stoltleika dylja jamaikubúgvar ikki útyvir. Tað stuttliga við hesum báðum støðunum (Fort Charles og Bob Marley Museum) var at eftir vitjan, so skuldi man skriva seg í eina gestabók. Í forvitni hugdu vit líka nakrar síður aftur, og har funnu vit útav, at ffýra føroyskar gentir hava verið í hesum báðum støðunum stutt frammanundan.




*Á gøtuni í Port Royal har fátækradømi er stórt*

### »Beverly Hills«

O´Neil, »ferðaleiðarin«, vildi sera fegin vísa okkum á ríkmannaumhvørvið í Jamaika, tað sokallaða »Beverly Hills«. Hetta vísti seg at vera eitt sera vakurt øki, men tað høga livistøði vísti seg tó ikki at vera nógv betur enn hjá einum miðal-føroyingi. Vit fingu eisini greitt frá, at um vit fóru inní »gamla« Kingston, har fátækradømi valdar, kundu vit ikki heilt vandaleysir ferðast ígjøgnum økið. Ein kundi vera óheppin at blíva álopin og rændur, men bidding var tann stóri trupulleikin í hesum umráði. Helst tá ið ein hevði hvítan húðarlit.

Møguliga vísti hann okkum mest hesi støðini, tí tey vóru tey tryggastu at ferðast í. Seinni

sosialurin